# Ung í Føroyum fullteknað

**20 januar var freistin úti at tekna seg til Ung í Føroyum 2006 í Norðurlandahúsinum. Fyriskipararnar kunnu siga frá, at stevnan er fullteknað**

UNGDÓMSSTEVNA

Hesaferð sleppa heili 70 ung framat, fyri at hátíðarhalda at Ung í Føroyum nú hevur verið til í fimm ár. Tey hepnu fáa bræv innan tvær vikur við boðum um, hvørja av teimum sjey verksmiðjum tey sleppa til, tá stevnan fer av bakkastokka 3. - 5. mars. Allir verksmiðjur eru undir leiðslu av yrkislistafólkum, og spenna frá sniðgevig til filmsgerð og ymsar palllistagreinar.

Teir ungu luttakararnir fáa høvi til at vísa fram egin verk á palli ella í framsýning, taka lut í lívligum verksmiðjum og arbeiða fram móti einum felags úrsliti, sum verður víst fram fyri almeninginum í Norðurlandahúsinum 5. mars 2006. Kunning er at finna á *www.ungiforoyum.info* og á *www.nlh.fo" www.nlh.fo*

Áhugavert og gleðandi er, at tilmeldingarnar hesuferð eru javnari býttar um alt landið enn nakrantíð fyrr, og meina fyriskipararnar, at hetta helst er úrslitið av at bæði Fuglafjarðar kommuna saman við øðrum kommunum eystan fyri í landinum og kommunarnar í Vágum, hava skipað fyri smærri Ung í Føroyum-stevnum undanfarna árið.

Mentamálaráðið og Føroya Banki stuðla Ungum í Føroyum.

VIÐMERKINGAR

# Uppskrivtin uppá vavgreyt



HØGNI HOYDAL
Løgtingslimur

**Ei dáni í, at fólk eru ørkymlað av øllum tosinum um uttanríkispolitiskar heimildir og ST-fráboðanir. Her verður roynt at lýsa gongdina í málinum. Tað er í sjálvum sær ein søga um kúvendingar, orðloysi og veðurhanapolitikk. Og tað er ein uppskrivt uppá vanligan føroyskan politiskan vavgreyt, sigur Høgni Hoydal í lesarabrævið**

**November 2004:**
Málið um uttanríkispolitisku heimildarlógirnar kemur alment fram í november 2004, tá undirritaði gjøgnum Norðuratlantsbólkin fær hendur á einum uppskoti um eina uttanríkispolitiska heimildarlóg fyri Grønland. Fyrispurningar verða beinanvegin settir bæði danska forsætisráðharranum og løgmanni. Danski forsætisráðharrin svarar, at samráðst verður við føroyingar á embætismannastigi. Løgmaður svarar, at tað verður ikki talan um at góðtaka eina uttanríkispolitiska heimildarlóg sum ta grønlendsku og leggur ístaðin eftir undirritaða fyri at síggja trøll á alljósum degi.

**Desember 2004**
Føroyskir serfrøðingar, sum hava lisið tað grønlendska uppskotið skíra tað afturstig í kjaksending hjá Boga Godtfred í SvF. Kári á Rógvi metir tað sum "eitt stig til viks og tvey stig aftur".

**Januar 2005:**
Í valstríðnum til fólkatingsvalið í januar 2005 fara bæði Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin til val uppá, at vit skulu ikki góðtaka danska uppskotið um uttanríkispolitiska heimildarlóg. Hinvegin krevja teir, at vit skulu yvirtaka uttanríkispolitikkin, um Danmark leggur meira fullveldi til ES. Eitt fólkafloksvalevni lýsir í bløðunum við, at Fólkaflokkurin fer ongantíð at góðtaka "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne", tí tá eru vit fullspottað.

Bæði Anfinn Kallsberg og Jóannes Eidesgaard finnast harðliga at, at Føroyar og Grønland verða koyrd í sama pott í uttanríkispolitikki.

**Februar 2005:**
Eftir fólkatingsvalið í februar 2005 leggur danska stjórnin uppskotið til uttanríkispolitiska lóg fyri Grønland fyri Fólkatingið. Norðuratlantsbólkurin tekur málið upp og mótmælir. Løgmaður tekur undir og finst at donsku stjórnini.

Norðuratlantsbólkurin veitir løgmanni stuðul – hóast grønlendsku limirnir harvið ganga ímóti sínum egnu flokkum í Grønlandi – og heitir á danska forsætisráðharran um at taka grønlendska uppskotið aftur, tí tað fer at binda føroyska landsstýrið, um tað verður viðgjørt á Fólkatingi. Málið verður fyribils tikið av dagsskránni í Fólkatinginum.

**Mars 2005:**
Løgmaður og danski uttanríkisráðharrin skriva knappliga undir eitt sonevnt "Fámjinsskjal", sum beinleiðis vísir til ta uttanríkispolitisku heimildarlógina, ið løgmaður og Fólkaflokkurin eru farnir til val uppá at vera ímóti. Í skjalinum verður millum annað sagt, at føroyingar bert skulu kunnast og sleppa við onkuntíð, tá danska stjórnin tekur avgerðir um føroysk mál. Eisini verður í Fámjinsskjalinum staðfest, at um føroyingar skuldu funnið uppá at latið upp eina umboðsstovu uttanlands, sum ikki liggur á somu adressu sum danska sendistovan, so kann tað kanska loyvast – men treytin er, at danska flaggið skal veittra uttanfyri og danskir ríkisskjøldurin skal standa á hurðini!

Grønlendsku limirnir í Norðuratlantsbólkinum undrast stórliga og kenna seg hildnar fyri gjøldur: Eftir at teir hava roynt at hjálpa føroyska løgmanninum, skrivar hann nú sjálvur undir eitt skjal, sum gongur beint ímóti hesum.

**Apríl 2005:**
Løgmaður og danski forsætisráðharrin boða frá í fjølmiðlunum, at teir hava undirskrivað eina felags yvirlýsing um yvirtøkulóg og flogvøll. Innihaldið er meinlíkt tí "tilboði", sum Poul Nyrup Rasmussen bjóðaði Føroyingum og legði fram á fólkatingi í 1998. Tásitandi samgonga vísti hesum frá sær.

**29. apríl 2005:**
Ein donsk lóg um uttanríkispolitiskar heimildir verður løgd fram á løgtingi saman við ein føroyskari lóg. Lógirnar eru orðaræt tær somu, sum lógin fyri Grønland, ið bæði løgmaður, Fólkaflokkurin og allir serfrøðingar hava víst frá sær. Í bæði danska og føroyska lógartekstinum verður millum annað sligið fast:

at føroyingar hava ongan myndugleika í altjóða heiminum, men kunnu bert samráðast við onnur vegna Danmark undir heitinum "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne"

at føroyingar hava ongan myndugleika yvirhøvur í hernaðarmálum

at føroyingar ikki hava loyvi at gera nakað sum stríðir ímóti áhugamálunum hjá danska ríkinum

at danir skulu kunnast áðrenn, undir og eftir allar samráðingar so høvi verður at tryggja áhugamálini hjá danska ríkinum.

Viðmerkingarnar til donsku lógina siga millum annað, at føroyingar hava ongan altjóða rætt, men eru undir danskari grundlógarfatan, og kunnu ikki hava sjálvstøðugar heimildir uttan so at danska grundlógin verður broytt. Harafturat verður sagt, at danska ríkið er eitt eindarríki, har allar heimildir liggja hjá Fólkatinginum og stjórnini.

Viðmerkingarnar til føroysku lógina mótmæla á ongan hátt donsku viðmerkingunum, men reksa bert upp ásetingar úr heimastýrislógini og góðtaka uppáhaldið um, at føroyingar hava ongi rættindi uttan tey, ið danska fólkatingið gevur føroyingum.

**Mai 2005:**
Undir orðaskiftinum á tingi vísir andstøðan á, at talan er um eitt stórt afturstig. Víst verður millum annað á, at løgmaður og Fólkaflokkurin nú ganga beint ímóti tí, sum teir áður hava sagt – og at hetta er fyrstu ferð, at Løgtingið samtykkir lógávu, ið beinleiðis leggur alt vald til Danmarkar.

Løgmaður og formaður Fólkafloksins viðganga undir orðaskiftinum, at teir hava verið trýstir til at ganga frá sínum sjónarmiðum. Teir siga kortini, at tað fær ongan týdning og fer ikki at verða brúkt av donskum myndugleikum, at Løgtingið samtykkir donsku fatanina av Føroyum sum ein danskur landslutur.

Løgmaður førir alment fram, at við nýggju lógini fer nú at bera til at gerast fullgyldugur limur í Norðurlandaráðnum, EFTA og at undirskriva handilssáttmála við Ísland.

Á miðjari nátt samtykkir Løgtingið bæði donsku og føroysku lógina. Tjóðveldisflokkurin leggur fram misálit á løgmann við teirri grundgeving, at grov villeiðing er farin fram og at týdningarmikil rættindi hjá føroyska fólkinum standa uppá spæl. Uppskotið fellur.

Í svarum sínum á fólkatingi sigur Anders Fogh Rasmussen, at uttanríkispolitiska lógin fer ikki at loyva føroyingum at gerast sjálvstøðugur limur í altjóða felagsskapum. Millum annað er ein felagsskapur sum hvalaveiðifelagsskapurin NAMMCO, har Føroyar eru sjálvstøðugur limur: "eitt mistak, sum ikki skal endurtaka seg", sigur Fogh Rasmussen.

**August 2005:**
Tað verður staðfest, at landsstýrið kann ikki gera fríhandilssáttmála við Ísland eftir nýggju lógini. Bert tí at sáttmálin við Ísland var liðugur í undanfarnu samgongu, og áðrenn nýggja lógin kom í gildi, er møguligt hjá Løgmanni at undirskriva sáttmálan.

Danski forsætisráðharrin ger greitt, at føroyingar kunnu ikki hava sjálvstøðugan limaskap í EFTA, soleiðis sum løgmaður hevur hildið uppá – men kanska okkurt avmarkað tilknýti, um fleiri yvirtøkur verða framdar.

Tjóðveldisflokkurin heitir í opnum brævi á løgmann um at forða fyri, at nýggja lógin verður fráboðað ST, tí tá vil altjóða samfelagið fáa boð fra donsku stjórnini um, at Føroya fólk hevur samtykt at sleppa sínum rættindum og gerast "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne".

**November 2005:**
Danska stjórnin boðar ST frá, at uttanríkispolitiska heimildarlógin er samtykt í bæði Danmark og í Føroyum, og at hetta er í samsvari við sjálvsavgerðarættin hjá føroyska fólkinum. Løgmaður boðar hvørki samgongu ella andstøðu frá nøkrum, og uttanlandsnevnd Løgtingsins veit onki.

**1. januar 2006:**
Løgmaður boðar frá í nýggjársrøðuni, at nú er eitt øgiligt frambrot hent, tí danska stjórnin hevur fráboðað sjálvsavgerðarrætt føroyinga. Hann vil vera við, at hetta er eitt bragd hjá landsstýrinum, sum nú hevur avgreitt tað, sum undanfarna landsstýrið strembaði eftir.

Tjóðveldisflokkurin mótmælir hvassliga og fær hendur á skjalinum, ið er sent ST. Har kemur fram, at talan er júst um tað, ið Tjóðveldisflokkurin hevur ávarað ímóti – t.e. at hetta er ein fráboðan um danskt fullveldi í Føroyum. Hetta vátta allir serfrøðingar somuleiðis.

Tjóðveldisflokkurin heitir á løgtingsformannin um at kalla tingið saman til tess at viðgera eitt uppskot um at boða ST frá, at Føroya fólk hevur ongantíð tikið undir við hesum lógum, ið nú eru fráboðaðar ST.

**Fyrra helvt av januar 2006:**
Løgmaður fer nú í verjustøðu og sigur seg onki hava havt við hesa fráboðan at gera, sum hann gav sær sjálvum æruna fyri í nýggjársrøðuni.

Samstundis fer Løgmansskrivstovan nústaðni undir at fáa ráð frá serfrøðingum. Hetta elvir til, at Løgmansskrivstovan knappliga roynir at fáa danska Uttanríkisráðið at senda eina nýggja fráboðan til ST við eini umseting av teirri føroysku lógini (vit kunnu spyrja hví, tá alt var so gott 1. januar?)

**Um miðjan januar 2006**
Fólkaflokkurin er undir hørðum trýsti frá einum tingmanni og frá parti av baklandinum. Anfinn Kallsberg fer á ein fund hjá Konservativa Tingbólkinum á fólkatingi. Har sigur danski uttanríkisráðharrin honum, at teir eru í samráðingum við landsstýrið um at fáa føroysku lógina nevnda næstu ferð ein fráboðan fer til ST.

Anfinn Kallsberg ringir til føroysku fjølmiðlarnar og sigur, at nú hevur hann ornað tað, sum løgmaður ikki hevur klárað.

Løgmaður er í øðini inn á Anfinn Kallsberg og Fólkaflokkin, tí hann ger gjøldur burturúr løgmanni og roynir at taka æruna av tí, sum landsstýrið frammanundan hevur tosað við donsku stjórnina um.

Tjóðveldisflokkurin ger greitt, at um ætlanin er at senda føroysku lógina og viðmerkingarnar til ST, so er støðan uppaftur verri og pínligari, tí har stendur onki, ið kann afturvísa donsku støðuna. Tvørturímóti er hetta helst fyrsta løgtingslóg nakrantíð, sum sigur í lógargreinunum, at føroyingar hava ongi rættindi og bert kunnu gera tað, ið danska stjórnin vil.

**Februar 2006:**
Uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum verður viðgjørt á løgtingi. Uppskotið snýr seg einfalt um, at Løgtingið staðfestir okkara tjóðarrættindi og heitir á landsstýrið um at boða ST frá, at Føroya fólk hevur ongantíð tikið undir við lógunum og fráboðanunum, ið eru sendar ST.